# Banknordik hevði 416 mió. kr. í avlopi í 2010

**Framgongdin í inntøkunum er 30% og stavar einamest av altjóða vøkstri. BankNordik stendur við sína varligu strategi og er framvegis millum sterkastu bankar í Norðurlondum**

- Úrslit áðrenn skatt 416 mió. kr. mótvegis 135 mió. kr. í 2009
- Renting av eginpeningi 22,4% áðrenn skatt mótvegis 8,5% í 2009
- Inntøkur frá banka- og tryggingarvirksemi 644 mió. kr. mótvegis 497 mió. kr. í 2009
- Niðurskrivingar á útlánum vóru 167 mió. kr. mótvegis 128 mió. kr. í 2009, samsvarandi 1,5% av útlánum og ábyrgdum
- Solvensur 17%, meira enn tað dupulta av solvenskravinum hjá bankanum
- Útlán lægri enn innlán (ávikavist 8,7 mia. kr. og 8,8 mia. kr.)
- Gjaldføri við ársenda er næstan 3 ferðir hægri enn lógarkravið 2010 var merkt av nógvum stórum broytingum í BankNordik. Tíðliga í árinum yvirtók bankin 12 deildir í Danmark og í Grønlandi frá Sparbank. Bankin fekk við hesum 30.000 nýggjar kundar, víðkaði virkisøkið við meira enn einum triðingi, vendi innlánsundirskotinum til eitt yvirskot og víðkaði grundarlagið fyri framhaldandi sunnum vøkstri.

Í mars 2010 seldi BankNordik sín part í Bakkafrost í sambandi við eina væleydnaða skráseting av fyritøkuni á virðisbrævamarknaðinum í Oslo. Sølan økti frammanundan sterka kapitalgrundarlagið hjá bankanum við einum kapitalvinningi á 380 mió. kr.

Í góðari tíð áðrenn statsveðhaldið til bankasektorin og kundarnar varð tikið aftur, bygdi bankin ríkiliga nógv gjaldføri upp. Tíðin eftir afturtøkuna vísti, at vanligu marknaðartreytirnar vóru til fyrimuns fyri ein sterkan banka sum BankNordik, og ein stigvís avtøka av tilbúgvingini kundi tískil verða sett í gongd móti endanum á árinum í fjør og fyrst í hesum árinum.

Innanhýsis í bankanum vórðu allar KT-skipanir lagdar um til KT-veitaran SDC. Tað tyngdi fyritøkuna, men umleggingin var strategiskt týdningarmikil bæði fyri framhaldandi menningina av kundatænastuni og fyri at økja effektivitetin. Bæði eru týdningarmikil mál í BankNordik.




*Janus Petersen, forstjóri í BankNordik, greiðir frá góða úrslitinum hjá bankan um fyri 2010*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Millum sterkastu

"BankNordik hevur verið ígjøgnum eitt óvanliga hendingaríkt tíðarskeið," sigur Janus Petersen, forstjóri í BankNordik samtakinum. "Samstundis sum onnur hava skorið niður, hava vit tvífaldað støddina á bankanum eftir einans tveimum árum og eru nú virkin á fýra ymsum marknaðum – í Grønlandi, Íslandi, Føroyum og Danmark. Tað gevur okkum nýggjar avbjóðingar, men fyrst av øllum gevur tað okkum nýggjar møguleikar fyri at halda fram við okkara framgongd, bygd á eina fasta og skerpaða strategi og áhaldandi stranga stýring av váðaprofilinum."

Við eini eginogn á 2,0 mia. kr. og hybridum ábyrgdarkapitali á 203 mió. kr. hevði BankNordik ein solvens upp á 17% við ársenda 2010. Talið skal síggjast í mun til standardkrøvini í bankalógini á 8% og individuella solvensin hjá bankanum, sum er lægri enn 8%. BankNordik er tískil ein tann sterkasti bankin í Norðurevropa..

Við eini kursøking á 9,5% var BankNordikpartabrævið millum bestu bankapartabrøvini á virðisbrævamarknaðinum í 2010. Vinningurin skal ikki minst síggjast út frá lutfalsliga lága váðaprofilinum hjá bankanum.

Sum avleiðing av luttøkuni í Bankapakka I í 2008-10 er útgjaldið av vinningi hjá BankNordik framvegis tengt at avmarkingum. Lagt verður fram fyri ársaðalfundin 25. mars 2011, at 40 mió. kr. verða útgoldnar, samsvarandi úrslitinum síðan stuðulsskipanin helt uppat 1. oktober 2010, og at vinningur útyvir hetta ikki verður útgoldin fyrr enn í 2012 (treytað av framhaldandi ríkiligum solvensi).

"Størstu uppgávurnar í ár verða at skapa framhaldandi vøkstur, samstundis sum vit halda fast við ein lágan váða og leggja dent á effektivitet" Tey mongu týdningarmiklu stigini, sum vit tóku í fjør geva okkum góðar møguleikar fyri áhaldandi sunnari menning," sigur Janus Petersen.

Bankin hevur lagt ætlanir um fleiri átøk, bæði innanhýsis og úteftir, men nøkur teirra fáa ikki fult virki fyrr enn um tvey-trý ár. Leiðsla bankans væntar eitt úrslit á 100-140 mió. kr. í 2011 áðrenn virðisjavningar.

# Ger bindiferð til Føroya

**Ragnheiður Eiríksdóttir hevur í skjótt tevy ár skipa fyri sonevndum bindiferðum, og í ár verður leiðin løgd umvegis Føroyar við einum ferðalagi, sum í høvuðsheitinum kemur úr USA, Kanada, Hollandi og Australia**

Leo Poulsen

Tað eru nú tvey ár síðani, at Ragnheiður Eiríksdóttir byrjaði fyritøku sína, Knitting Island. Endamálið er at savna fólk, sum eru áhugað í at binda, og at skipa fyri ferðum fyri hesum fólkum.

- Eg havi skipað fyri hesum ferðum í Íslandi, og tað er í høvuðsheitinum fólk úr USA, Kanada, Hollandi, Onglandi og Australia, sum koma hesar ferðirnar, men tú kanst siga úr øllum heiminum, sigur Ragnheiður Eiríksdóttir.

Hon hitti í fjør Katrinu í Geil, og har kom so hugskotið at kombinera Ísland og Føroyar í einu og somu ferð.

- Tað kom seg soleiðis, at hon gjørdist mín samstarvspartnari í Føroyum, og soleiðis kom hendan ferðin í lag, sigur Ragnheiður Eiríksdóttir.

Hendan ferðin verður gjørd fram við suðurstrondini á Íslandi til Seyðisfjørðin og síðani við Norrönu til Føroya.

- Katrina í Geil tekur so ímóti okkum í Havn, og vit verða so her í fýra nætur. Vit hava eina sera spennandi og einastandandi skrá, har Katrin aí Geil fr at undirvísa í trimum ymiskum workshops. Og tað verður púra ólíkt øllum, sum eg kenni frá øðrum bindilærarum í verðini, sigur Ragnheiður Eiríksdóttir.

Hon er útlærd á handarbeiðsskúla í Kolding, og hevur sín heilt serliga innfallsvinkul, heldur íslendska bindikvinnan.

- Eg royni at leggja dentin á, at tað skal verða nakað heilt serligt á mínum ferðum, og her er tað, at Katrina í Geil traðkar inn, sigur Ragnheiður Eiríksdóttir.

## Universalt mál

Hon vil hava, at tey ferðandi skulu sleppa heilt inn at fólkunum, og tað sleppa tey í Føroyum.

- Tá tað snýr seg um Føroyar, so fara vit at skipa so fyri, at tey ferðandi sleppa at uppliva føroyskar dans, sum er nakað heilt fyri seg, sigur Ragnheiður Eiríksdóttir.

Sjálv upplivdi hon føroyskan dans sunnukvøldið úti í Nólsoy og hon er ikki í iva.

- Eg segði við Katrinu, at um hon eina aðru ferð hevði ein gest, so skuldi hon ikki spyrja, um tey vildu uppliva føroyskan dans, hon skal bara taka tey við, sigur Ragnheiður Eiríksdóttir.

Hon sigur, at tá útlendskar bindikonur hitta íslendskar og nú eisini føroyskar bindikonur, hendir nakað heilt óvanligt.

- Tær tosa kanska ikki sama mál, men tað hevur einki at siga. Tær hittast og síggja, hvat hinar hava gjørt og bundið, og tær skilja hvørja aðra kortini, sigur Ragnheiður Eiríksdóttir.

Tað, sum hesi fólk leita eftir, er nakað heilt fyri seg, og tað eru ógvuliga fá, sum sleppa við á hesum ferðunum.



- Talan er um eini 10-12 fólk sum eru við á hesum ferðunum, og tá er tað, at hvør einstakur fært tíð til at hjúklast um, sigur Ragnheiður Eiríksdóttir.

Undirvísingin verður munandi meiri til tann einstaka, og tí fáa tey luttakandi munandi meiri burtur úr.

Fyrsti túrurin til Føroya verður í september, og Ragnheiður Eiríksdóttir vónar, at tað bert er byrjanin til eitt langt og fruktagott samatarv.